# MIÐLASTUÐULSNEVNDIN

22. januar 2024

*Frágreiðing um virksemi hjá Miðlastuðulsnevndini í 2023*

# Miðlastuðul latin 14 verkætlanum og fimm miðlum í 2023

Tvær milliónir krónur vóru settar av á fíggjarlógini fyri 2023 til miðlastuðul. Miðlastuðulsnevndin hevur latið 14 verkætlanum og fimm miðlum hendan stuðul. Stuðulin er latin sum verkætlanarstuðul og sum stuðul til skjalprógvaðar lønarútreiðslur.

Verkætlanarstuðul kann verða latin til miðlar, ið leggja seg eftir at gera loftborið ella skrivligt tilfar, sum verður mett at hava journalistiska dygd og samfelagsligt virði. Talan kann vera um eitt nú greinarøð, heimildarsending, poddvarp o.a.

Stuðul til lønarútreiðslur kann verða latin til miðlar, sum hava skjalprógvaðar lønarútreiðslur undanfarna roknskaparár.

Sambært miðlastuðulslógini verða 70% av játtanini latnar til verkætlanir og 30% til lønarstuðul. Í krónum skal sostatt latast kr. 1.400.000 til verkætlanir og kr. 600.000 til skjalprógvaðar lønarútreiðslur.

## Verkætlanarstuðul til 14 verkætlanir

Miðlastuðulsnevndin tók á fundi 20. juni 2023 endaliga avgerð um at játta seks miðlum stuðul til 14 miðlaverkætlanir í 2023.

Tilsamans vórðu 57 umsóknir latnar inn.

Umsóknirnar vórðu mettar út frá journalistiskari dygd og samfelagsligum virði. Miðlar við ábyrgdarhavandi redaktøri, og sum fevna um eitt breitt evnisøki og hava ein regluligan tíðindastreym, kundu søkja um miðlastuðul.
Miðlastuðulsnevndin legði ítøkiliga dent á trý parametur í viðgerðini: Innihald/hugskot, kostnað og útbúgving/royndir hjá viðkomandi journalisti ella toymi. Grundað á hesi viðurskifti og endamálið við miðlastuðulslógini annars, gjørdi nevndin eina heildarmeting av øllum innkomnu umsóknunum og játtaði stuðul til 14 av verkætlanunum.

Mannagongdin var tann, at helvtin av játtanini varð útgoldin í beinanvegin, meðan hin helvtin verður rindað, tá ið framleiðslan er liðug.

midlastudul@ammr.fo

Hesar verkætlanir fingu stuðul í 2023:

| *Miðil* | *Verkætlan* | *Upphædd (kr.)* |
|---|---|---|
| Sosialurin | Vitjan á smáplássum | 200.000,00 |
| Sosialurin | Ummæli av bókmentum v.m. | 103.000,00 |
| Sosialurin | Oyggjaleikir 2023 | 70.200,00 |
| Sosialurin | Hvussu hava barnafamiljurnar tað í Føroyum | 79.200,00 |
| Portal.fo | Føroyar á grønum vegamóti | 115.000,00 |
| Sosialurin | Flóttafólk | 66.000,00 |
| Sp/f 01.01.14 | Poddvarp um virðisøking | 89.761,54 |
| Sp/f 01.01.14 | Føroysk framleiðsla | 48.000,00 |
| Eysturoyarportalurin | Politiska sannføringin í Eysturoy | 130.000,00 |
| Dimmalætting | Hvørja pensjón skal eg velja | 50.000,00 |
| Dimmalætting | Michel | 150.000,00 |
| Sosialurin | Ung og miðlar | 71.500,00 |
| Sosialurin | Berlin | 77.000,00 |
| Blue Faroe Islands | Kvinnur í Sjóvinnuni | 150.000,00 |
| *Tilsamans* | | *1.399.661,54* |

**Stuðul til skjalprógvaðar lønarútreiðslur játtaður fimm miðlum**

Á fundi 11. januar 2024 tók Miðlastuðulsnevndin endaliga avgerð um játtan av miðlastuðli til skjalprógvaðar lønarútreiðslur. Játtanin til hendan stuðul var tilsamans kr. 600.000.

Sjey miðlar søktu um hendan miðlastuðulin.

Ein miðil lat umsókn sína inn eftir umsóknarfreistina og ein miðil kundi ikki vísa á skjalprógvaðar lønarútreiðslur fyri undanfarna roknskaparár, ið sambært lógin skal vera útrokningargrundarlagið fyri hendan miðlastuðul. Hesar umsóknir vórðu tí noktaðar.

Fimm miðlar luku treytirnar. Miðlastuðulsnevndin kundi síðani staðfesta, at ein miðil fór um markið fyri, hvussu nógv ein einstakur miðil ella eitt miðlasamtak kann móttaka í stuðli – eitt mark, ið miðlastuðulslógin ásetir til 40% av teimum kr. 600.000. Stuðulin til hendan miðil varð tí settur niður og býtið millum miðlarnar varð hareftir hetta:

| *Miðil* | *Upphædd (kr.)* |
|---|---:|
| Jn.fo | 6.914,99 |
| Norðlýsið | 63.665,97 |
| Sp/f 01.01.2014 (FM1) | 98.727,91 |
| Knassar (portal.fo) | 190.691,12 |
| Sosialurin | 240.000,00 |
| *Tilsamans* | *600.000,00* |

**Nýggj nevnd**

Nýggj miðlastuðulsnevnd varð vald í september í 2023. Runa Preeti varð vald sambært tilnevning frá Fróðskaparsetri Føroya, John Johannessen varð valdur sambært tilnevning frá Føroysk miðlafólk, og Janus Haraldsen varð valdur sum formaður sambært tilnevning frá Búskapar- og Løgfrøðingafelagnum Føroya.
Varafólk teirra eru ávikavist Martin N. Simonsen, Sigrún Halldórsdóttir Brend, og Anna Rein.

**Økt játtan í 2024**

Løgtingið samtykti fyri jól fíggjarlógina fyri 2024. Játtanin til miðlastuðul varð økt við kr. 900.000 til kr. 2.900.000, umframt at kr. 100.000 vórðu játtaðar til umsitingina hjá nevndini.

22. januar 2024

Vegna Miðlastuðulsnevndina
Janus Haraldsen, formaður